Tosa seg á ørmundarhús

Ta› gerst alt meira vanligt, at næmingar ganga vi› fartelefon í skúlanum, og ta› er ikki bara í framhaldsdeildini, men eisini í teimum yngru flokkunum. Telefonin órógvar nógv og fer eisini vi› einum fittum parti av lummapeninginum hjá ungum

Alt fleiri ganga nú vi› fartelefon at oyranum, og trupulleikar standast av hesum í skúlunum um landi› Mynd: Jens Kr. Vang

STEFAN Í SKORINI

Fartelefoni hevur rættiliga vundi› uppá seg seinastu tí›ina, og stø›an í Føroyum líkist alt meira teimum í hinum Nor›urlondunum, sum hava eitt ta› største tali› av fartelefonum fyri hvønn íbúgva. Nú taka tey ungu eisini vi› n‡ggja møguleikanum, og skúlarnir hava fingi› ein n‡ggjan trupulleika.

Føroya Tele hevur vi› einum n‡ggjum átaki lagt seg eftir teimum yngru brúkarunum. Ætlanin er at veita teimum møguleikan at hava fartelefon uttan fáa ovurstórar telefonrokningar, tá mána›urin er at enda komin.

Føroya Tele Tí› ver›ur ta› nevnt. Hetta er eitt hald, har brúkarin leggur peningin á bor›i›, á›renn tosa› ver›ur. Brúkarin fær eitt kort, sum gevur møguleika at tosa fyri nakrar hundra› krónur í senn, á›renn n‡tt má keypast. Um ein hevur vanligt hald, sendir telefonverki› eina rokning hvønn mána›. Ta› er heldur ikki óvanligt, at ung hava vanligt hald.

Ætlanin er at fáa fleiri yngri brúkarar. Hetta gevur foreldrum møguleikan at hava tamarhald á n‡tsluni hjá børnunum. Fleiri foreldur velja at keypa børnunum fartelefon, og tá er best at keypa kort, so børnini ikki misn‡ta telefonina.

Selja mest til ung

80% av teimum, sum hava fingi› sær eitt Føroya Tele Tí› hald, eru ungdómar. Mest vanligt er, at tey sjálv seta eitt hald á stovn, og st‡ra n‡tsluni sjálv. Hini haldini eru ofta til húski, sum hava eitt hald frammanundan.

- Vit hava eina kenslu av, at tey ungu mest n‡ta telefonina til at senda bo› vi› og at ver›a tøk, so onnur altí› kunnu fáa fatur á einum. Ta› er tó torført at meta um, hvussu nógv tey ungu brúka til fartelefonina, sigur Jónhild Rasmussen, sum er tænastumennari á Føroya Tele.

Fyri at markna›arføra ta› n‡ggja haldi› vi› korti, hevur Føroya Tele gjørt av, at skrivlig bo› ikki kosta naka› ta fyrstu tí›ina. 1. november ver›ur hetta tó broytt, og tá fer ta› at kosta hálvaa›ru krónu at senda eitt sms. Hetta hevur eisini veri› gjørt, tí at Føroya Tele hevur roynt eina n‡ggja sms-stø› í Føroyum. Í november fara øll føroysk sms um hesa stø›ina.

Trupulleiki á skúlunum

Føroysku fólkaskúlarnir eru eisini farnir at merkja n‡ggja átaki› hjá Føroya Tele, sum hevur til endamáls at fáa fatur á yngri brúkarunum, sum í framtí›ini eisini kunnu gerast gó›ir kundar. Hetta er ta› sama, sum telefyritøkurnar í Danmark hava gjørt, og ta› er eftir øllum at døma eydnast sera væl ni›ri á flatlondum og í hinum Nor›urlondunum vi›. Finnland og Ísland eru tey londini, sum hava lutfalsliga størst tal av fartelefonum í heiminum.

Símun Abrahamsen, varaskúlastjóri á Argja skúla, sigur, at tey á skúlanum hava merkt trupulleikan, og at hann er vaksandi.

– Fyri ta› fyrsta er ta› ein kapping millum næmingarnar at hava ta› flottastu og bestu telefonina, sigur Símun.

Markna›urin av fartelefonum í Føroyum er enn sera stórur hjá fyritøkum, sum selja fartelefonir. Av Føroya Tele ver›ur sagt, at tey selja fleiri fartelefonir enn fyrr, og hvønn dag leggjast fleiri haldarar afturat.

– So er ta› eisini eitt ítriv í sær sjálvum at senda sms ella stutt skrivlig bo› sínámillum, sigur Símun Abrahamsen.

Varaskúlastjórin metir tó ikki, at telefonirnar ver›a nógv n‡ttar í tímunum, men ta› er kanska meira tí, at lærararnir ansa væl eftir, at næmingarnir ikki sita og skriva vi› telefonini ísta›in fyri vi› bl‡antinum. Har hevur skúlin ta stø›u, at fartelefonin er banna› í tímunum. Men næmingar eru næmingar, og ta› eru óiva› fleiri, sum fjasast vi› telefonini undir bor›inum.

Sama fyribrigdi er eisini á ø›rum skúlum. Jógvan Martin Mørk, varaskúlastjóri á Eysturskúlanum, sigur, tey merkja eisini ta› sama.

– Fartelefonirnar eru komnar í skúlan fyri at vera, og vit mugu tí royna at hava tamarhald á n‡tsluni. Her hava vit tann politikk, at um næmingarnir ver›a fanga›ir í at brúka fartelefonina í tímanum, ver›ur hon tikin, og foreldrini mugu seta seg í samband vi› okkum fyri at fáa hana aftur. Hetta merkir, at børnini sjálv mugu fortelja heima, hví telefonin er tikin, sigur Jógvan Martin Mørk.

Hesar reglur hava veri› galdandi, sí›an skúlaári› byrja›i, og onkur er tikin á búri og hava veri› noydd at lata telefonina frá sær.

Á minni plássum er n‡tslan millum næmingarnar í fólkaskúlanum eisini økt. Richard Johansen, skúlastjóri á Stranda skúla, sigur tó, at trupulleikar hava ikki veri› í tímunum, men at børnini tosa og senda bo› dúgliga í fríkorterunum. Enn hevur tó ikki veri› ney›ugt at seta naka› í verk fyri at tálma n‡tsluni.

Vaksandi trupulleiki

– Ta› er tó heilt avgjørt ein vaksandi trupulleiki vi› fartelefonum á skúlanum, og ta› ver›ur spennandi at síggja, hvussu stø›an ver›ur aftaná konfirmatiónirnar, tá tey n‡fermdu koma aftur í skúla. Tá eiga vit at hyggja eitt sindur álvarsamari uppá hasi tingini vi› fartelefonum, metir Símun Abrahamsen.

Ta› ver›ur í løtuni reklamera› í blø›um og ø›rum mi›lum vi› fartelefonum til konfirmantin. Ein fartelefon eru heldur ikki ein serliga d‡r konfirmatiónsgáva, og tí er nærliggjandi at hugsa sum Símun Abrahamsen, at fleiri ung ganga vi› fartelefon, aftaná prestur hevur lagt hond á høvdi›.

- Vit halda eisini, ta› er eitt sindur skelkandi, at ta› ikki bara eru tey eldru í framhaldsdeildini, sum kima í heilum, men eisini tey yngru frá sjeynda flokki og ni›ureftir. Ta› einasta vit hava tiki› stig til er fyri at tálma n‡tsluni er at banna› teimum í tímunum, me›an undirvísing er, sigur Símun.

Á fleiri mi›námsskúlum ver›ur vi› skeltum heitt á næmingarnar um at sløkkja telefonina, me›an teir eru á skúlaøkinum, tí hetta er ein trupulleiki, sum vindur uppá seg. Ta› tykist tó, at fleiri fólk hava brúk fyri at læra seg at hava fartelefon.

– Eg kundi hugsa mær, at vit um eini tíggju ár fara at flenna eftir hesum trupulleikanum, leggur Símun afturat, tí tá hava fólk kanska fingi› eina hóskandi fartelefonmentan.

Rakar bankabókina meint

Ta› er ikki óvanligt, at ung, sum ganga í skúla, hava eina telefonrokning, sum táttar í tær túsund krónurnar um mána›in. Tá tosa› ver›ur fyri so nógvan pening, um ta› er vi› Teletí› ella vi› vanligum haldi, ver›ur sjálvandi eitt sindur tunnligari millum krónurnar á bankabókini.

Um talan er um næming, sum gongur á mi›námsskúla, og er eldri enn 18 ár, er lestrarstu›ulin 2-3000 krónur um mána›in, alt eftir um næmingurin b‡r hjá foreldrunum ella úti. Sjálvt um rokningin bara er ni›ri á teimum fimmhundra›, er hetta ein stórur partur av inntøkuni.

Er talan hinvegin um fólkaskúlanæmingar, eru inntøkumøguleikarnir verri. Tey hava bara arbei›i eftir skúlatí› at dúva uppá og lummapening frá foreldrunum. Tá kann ta› roynast verri at fáa pening til vega fyri at tosa í telefon.

Ta› tykist tó, sum átaki› hjá Føroya Tele at fáa hendur á teimum yngru brúkarunum er eydnast, tí skúlarnir kenna seg noyddar at seta tiltøk í verk fyri at ste›ga n‡tsluni.

Næmingar selja fisk í gongugøtuni í Havn

Havnarfólk, sum munga eftir fiski, kunnu fara sær ein túr oman í gongugøtuna leygardagin

ÁKI BERTHOLDSEN

Tey havnarfólk, sum munga illa eftir fiski, kunnu leggja sær lei›ina í gongugøtuna leygarmorgunin.

Tí tá ver›ur stórur fiskamarkna›ur í gongugøtuni.

Ta› eru næmingar í tri›ja flokki í Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, sum fara at hava fiskamarkna› í Havn leygardagin, har tey fara at selja alskyns fisk.

Tey byrja› klokkan 10 um morgunin og hildi› ver›ur fram til einafer› naka› væl út á seinnapartin.

Hetta fer uttan iva at koma væl vi› hjá mongum, tí fiskur er trotvøra í Havn-í hvussu so er, fyri ein sámuligan prís.

Men tey í tri›ja flokki siga at tey ætla at vera sámulig í prísi.

Á fiskamarkna›inum ætla tey sær at hava alskyns fisk at selja, eitt nú toskaflak, kongafiskaflak, ræstan fisk, skeljar, rækjur, laks, saltfisk o.a.

Fiskin hava tey fingi› ymsasta›ni úr landinum, bæ›i úr Su›uroy og úr Nor›oyggjum og nógva sta›ni har ímillum.

Orsøkin til, at tey hava fiskamarkna›in, er, at tey savna pening inn til eina námsfer›, sum tey ætla at fara á seinni.

Tri›i flokkur í Fiskivinnuskúlanum er virkin. Leygardagin fara tey til Havnar at selja fisk í gongugøtuni fyri sámuligan prís

DAGFØR
TEG
sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Í býin Í býin Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Kaggin
Fríggja-og leygarkvøldið spæla
ROBERT OG VINMENN
5'ARI
frí.-, leyg.- og sunnukvøld
frá kl. 17.00
Kaggin
Kaggin
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk Mat-seðilin
Hósdagin 28. sept.: Grýturættur
Fríggjadagin 29. sept.: Búff steak
Leygardagin 30. sept.: Nakkasteik
Mánadagin 2. okt.: Kjøtrond
Týsdagin 3. okt.: Carbonadir
Mikudagin 4. okt.: Lasagna
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

HK HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spælir
DRIV
Sosialurin - 311820

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Eysturoy

Nor›oyggjar

Fótbólturin er li›ugur so nú er b…

Kostna›ur: 100 kr.
Leygarkvøldi› 30. sept. frá kl. 23.30 - 04.00
Í Ítróttarhøllini á Kambsdali
GÍ

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 30. september
"Martin" vendir plátum
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Vilja tygum vi› í
Í b‡in - hvønn hósdag
Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur